Oyggjablaðið


# Fólk í handlinum

*Tekstur: Snorri Brend*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

**Nú nærkast av álvara til ársins fyrstu stevnu – Norðoyastevnuna í Klaksvík. Henda stevnan verður í ár hildin á 74. sinni, og mong munnu ivaleyst minnast aftur á mangar hugnaligar løtur á stevnuni. Tíðirnar skifta, og spurningurin er, um stevnan hevur sama áhuga millum klaksvíkingar og norðoyingar í dag sum áður. Tann spurningin settu vit okkum at kanna. Inni í Inn-handlinum í Klaksvík hittu vit nøkur av viðskiftafólkunum. Spurningurin til teirra var hesin: *Gleðir tú teg til Norðoyastevnu í ár?***



*– Eg var meiri spentur fyrr, enn eg eri nú. Man er komin nakað upp í árini, men eg føli meg kortini ungan, hóast eg eri 56 ára gamal. Hesaferð verði eg tó ikki heima, tí vit fara avstað við Gadus áðrenn stevnuna.*

**Jóhan Mørkøre, Klaksvík**



*– Ja, eg gleði meg. Tað er so hugnaligt at ganga úti, serliga um veðrið er gott, tí so møtir man fólki og man fær eitt prát. Annars dámar mær sera væl at fara til útimøti um kvøldarnar.*

**Selma Egholm, Klaksvík**



*– Nei, eg er ikki spent, tí stevnan sigur mær so lítið.*

**Maria Norðoy, Viðareiði**



*– Eg gleði meg til kappróðurin og til at fáa fólk á vitjan*

**Kári Purkhús, Klaksvík**



*– Eg gleði meg kanska ikki beinleiðis. Men mær dámar væl at lurta eftir kappróðrinum, og at ganga ein túr gjøgnum býin við dóttrini.*

**Elin Egilsdóttir, Klaksvík**



*– Ja, eg eri ótrúliga spentur.*

**Heðin Klakkstein, Klaksvík**

